# Nú skal Brandur taka Danmark

**Útgávan av fløguni hjá Brandi Enni í Danmark er framskundað til 10. mars, og í døgunum áðrenn og aftaná skal føroyski sangarin vitja í donskum sjónvarpssendingum og syngja í Palads**



*Brandur Enni skal í næstu viku vera við í donskum sjónvarpssendingum, og hann skal eisini syngja á stórum tiltaki í Palads í Keypmannahavn*

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Nú verða øll segl sett fyri at fáa Brand Enni fram í Danmark. Unglingin av Tvøroyri verður fløguaktuellur í Danmark um eina góða viku, og tá skal hann eisini vera við í donskum sjónvarpssendingum.

Sunnudagin 9. mars verður Brandur við í barnasendingini hjá Bubber á TV 2. Her skal Brandur syngja og práta við Bubber. Hetta er sama sending, sum Brandur í fjør var við í.

Hetta hevur gjørt, at útgávan er framskundað nakrar dagar, og mánadagin 10. mars kemur fløgan hjá Brandi í sølubúðirnar í Danmark.

Dagin eftir verður útgávan hildin við einum stórum tiltaki í Palads í Keypmannahavn. Har vera fjølmiðlafólk, plátufeløg og onnur boðin innar at frætta nærri um føroyska poppidolið, og Brandur skal eisini framføra nakrar sangir til hetta tiltakið.

### 13 sangir

Mikumorgunin skal Brandur vera gestur í morgunsendingini hjá TV 2, og ivaleyst verður nógv at síggja til hann í donskum fjølmiðlum annars í sambandi við útgávuna.

Útgávan hjá Brandi verður kallað upp eftir sangaranum sjálvum, og á fløguni vera 13 sangir, sum eru á enskum máli.

Allir teir ensku sangirnir frá útgávuni Waiting in the Moonlight eru við, og harafturat eru nakrir nýggir sangir við á fløguni, sum hava verið at hoyrt á konsertum og eru útgivnir á stakfløgum.

Ein sangur, sum ongantíð hevur verið frammi áður, Boys from America, er eisini við á donsku útgávuni.




# Føroya Bjór Gull í stórum fløskum

ØL
*Tíðindaskriv*

Føroya Bjór hevur nú gjørt av aftur at koma á marknaðin við 1,25 litursfløskunum við Gullølinum.

Ølið í hesum plastfløskum heldur sær í fimm til seks mánaðir, og síðani á ólavsøku í 2001 hevur borið til at keypt Veðraølið í hesum fløskum.

Á jólum varð Jólaølið selt í hesum fløskum, og av tí at hetta var somikið væl umtókt, hevur bryggjaríið í Klaksvík gjørt av nú at lata Gullølið í hesar fløskur.








# Løgmaður gongur undir Irak-samtykt

**Ein stórur meiriluti í løgtinginum gongur nú saman um at mótmæla, at USA saman við m.a. Bretlandi gongur einagongd í einum møguligum álopi á Irak. Uttan fyri stendur Fólkaflokkurin við løgmanni á odda. Anfinn Kallsberg lovar kortini at gera eftir einari samtykt hjá løgtinginum, men ivast, hvagar hann skal venda sær**

KRÍGSHÓTTAN
*Ingi Rasmussen*

Tað eydnaðist Javnaðarflokkinum at fáa tríggjar aðrar flokkar á løgtingi at taka undir við einum uppskoti um spentu støðuna í Irak. Sostatt er tað ein breiður meiriluti í løgtinginum, ið krevur, at eitt møguligt álop á Irak bert skal fremjast, um Sameindu tjóðir samtykkja tað.

Sambandsflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava skrivað undir løgtingsmálið, ið hevur til endamáls at boða frá einari felags almennari føroyskari støðu til krígshóttanirnar í Miðeystri. Bara Fólkaflokkurin og Miðflokkurin vilja ikki skriva undir fráboðanina.

Uppskotið er stutt og ljóðar soleiðis: »Føroya Løgting staðfestir, at øll tiltøk til tess at fáa Irak og Saddam Hussein at ganga undir ST-samtyktirnar skulu góðkennast av ST. Samstundis heitir løgtingið á løgmann um at boða frá løgtingsins síðu«.



*Logarnir standa frá »stars and stripes« undir einari mótmælisgongu í Manama, høvuðstaðnum í Bahrain, har fimta flotadeildin hjá US Navy heldur til. 3000 fólk mótmæltu, at USA áhaldandi senda fleiri hermenn til Golf-økið*

*Mynd: Reuters*

### ST skal stýra

Teir fýra flokkarnir siga í viðmerking til uppskotið, at ST varð stovnað eftir seinna heimsbardaga til tess at fyribyrgja kríggi millum heimsins lond, og ST hevur í nógvum førum staðið sína roynd, tá heimsfriðurin hevur verið í vanda. Uppskotstillararnir siga, at hetta er einasti politiski felagsskapur, har allar heimsins tjóðir kunnu møtast og viðgera heimsviðurskifti av ymiskum slag. Men seinastu árini er valdsjavnvágin í heiminum broytt munandi, soleiðis at eitt stórveldi, sum er USA, hevur stungið seg fram um øll hini.

»Vit meta tað sera avgerandi fyri at varðveita heimsfriðin, at ST felagsskapurin verður varðveittur. Somuleiðis at ætlaðar neyðugar avgerðir ímóti londum, sum ikki ganga undir treytir, settar av ST, verða tiknar í ST høpi«, siga Sambands-, Tjóðveldis-, Javnaðar- og Sjálvstýrisflokkurin í sínum felags uppskoti til samtyktar.

Sostatt eru tað bara samgonguflokkarnir, Fólkaflokkurin og Miðflokkurin, sum ikki hava undirskrivað uppskotið. Og tað er júst í Fólkaflokkinum, sum ikki stuðlar uppskotinum, at løgmaður ræður fyri borgum.

### Ongin adressa

Fólkaflokkurin hevur áður givið alment til kennar í einum brævi, at hann styðjar avgjørda politikkin hjá USA, sum streingir á at loypa á Irak fyri at fáa Saddam Hussain frá valdinum.

Anfinn Kallsberg løgmaður ásannar, at Fólkaflokkurin hevur eina heilt aðra støðu til málið, enn teir fýra flokkarnir. Hann lovar kortini at ganga undir eina samtykt hjá løgtinginum.

– Ein og hvør samtykt, sum løgtingið ger, skal umsitast. Tað er mín leiklutur, og tað fari eg sjálvandi at gera, um eg veri biðin. Eg havi bara eitt sindur ilt við at síggja, hvar eg skal boða frá hasum, tí í uppskotinum er ongin adressa. Er tað ST? Ella eru tað tær mannagongdir, sum slík mál hava sambært heimastýrislógini?, spyr Anfinn Kallsberg og sipar til, at so skal fráboðanin ganga umvegis Danmark.

Løgmaður væntar kortini, at tað fer at koma fram undir viðgerðini í løgtinginum, men hann sigur seg ivast í, um Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin eru samdir.

– Tað er neyvan av tilvild, at tað er so ógreitt orðað, sigur Anfinn Kallsberg.

### Løgin støða

Løgmaður kann stostatt koma í ta støðu, at hann skal boða altjóða samfelagnum frá einari støðu, sum gongur ímóti hansara persónligu og politisku sannføring. Kennist tað løgið?

– Jú, tað kanst tú siga. Men hvat eg haldi, er ikki áhugavert í hesum føri. Løgmaður hevur skyldu til at umsita tann politikk, sum løgtingið samtykkir, og tað sleppi eg ikki undan, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.

## Fakta

### Uppskot til samtyktar

»Føroya Løgting staðfestir, at øll tiltøk til tess at fáa Irak og Saddam Hussein at ganga undir ST-samtyktirnar skulu góðkennast av ST. Samstundis heitir løgtingið á løgmann um at boða frá løgtingsins síðu«.

## 35 tingmál í evstu løtu

LØGTINGIÐ
*Ingi Rasmussen*

Fríggjadagin var síðsta freist at handa løgtingsskrivsstovuni uppskot, sum skulu koma fyri løgtingið hesa tingsetuna.

Ofta er stórur aktivitetur upp undir evstamarkið hjá løgtinginum, og soleiðis var eisini hesaferð. 35 uppskot komu til løgtingsskrivsstovuna fríggjadagin, og tey vera alment løgd fyri løgtingið í dag. Tey 35 uppskotini býta seg soleiðis, at landsstýrið eigur tey 25 og andstøðan tey 10.

Hjá landsstýrinum er fyrst og fremst talan um lógaruppskot, meðan andstøðuuppskotini bæði eru uppskot til samtyktar og lógaruppskot.

35 løgtingsuppskot kunnu ljóða av nógvum, men hetta er heldur minni, enn tað onkuntíð hevur verið. Tað mesta, fólk minnast, var í 1997, tá yvir 100 uppskot vóru løgd fyri tingið á síðsta framløgudegi. Síðstu árini hevur tað ligið um sama tal, sum í ár.

Freistin at leggja uppskot fyri tingið er annars 4. mars, men av tí, at tey skulu vera løgtingsskrivsstovuni tríggjar dagar frammanundan, var freistin at fáa tey avgreidd fríggjadagin. Er okkurt átrokandi á skránni, kunnu 17 tingmenn fáa eitt uppskot fyri løgtingið áðrenn ólavsøku.